# FAMILJU- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

| | | |
|---|---|---|
| *Umfarsskriv* | Dagfesting<br>27.01.2004 | 1/2004 |
| | HMR. j. nr.<br>0.24-200400043/1 | Síða 1 av 1 |

Heiti

## Umfarsskriv um ognarrættin til kommunulæknajournalir

Familju- og heilsumálaráðið hevur kannað, hvørs ogn journalir, ið verða nýttar av kommunulæknum í teirra virksemi, eru. Eitt ávíst samskifti hevur verið millum teir føroysku myndugleikarnar og danska Heilsustýrið. Hetta hevur verið gjørt, bæði fyri at kanna eftir, hvussu hesin spurningur verður loystur í øðrum londum, tí ongar beinleiðis reglur svara hesum spurningi, og eisini tí heilsuverkið ikki er eitt yvirtikið økið/felagsmál.

Niðurstøðan er, at kommunulæknajournalir eru ogn landsins. Hetta kemst av, at kommunulæknar í Føroyum eru settir av Føroya Landsstýri og útinna læknavirksemi sítt í hølum, ið kommunan fær tilvega. Tessvegna eru kommunulæknar at samanbera við læknar á sjúkrahúsunum.

Eitt nú tá kommunulækni andast ella leggur frá sær, lýsir Føroya Landsstýri eftir nýggjum kommunulækna. Tað vil siga, at tær journalir, sum alment settir kommunulæknar nýta í sínum starvi, kunnu avloysarar og eftirfylgjandi kommunulæknar nýta á sama hátt í læknastarvi sínum. Kommunulæknajournalir eru soleiðis ikki privat ogn hjá kommunulæknunum. Uttan mun til, um journalirnar liggja hjá einum fyrrverandi ella núverandi kommunulækna ella á einum sjúkrahúsi, eru tær ogn landsins.

Kommunulæknaskipanin er sostatt at javnmeta við tað almenna føroyska sjúkrahúsverkið.

Familju- og heilsumálaráðið

Aibritt á Plógv
aðalstjóri

/

Barbara P. Vang,
fulltrúi

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 40 • TELEFAX 35 40 48 • E-MAIL: HMR@HMR.FO